# Óli Holm tók avgerðina

**Ein avgerð verður til eina avgerð, tá hon verður niðurfeld og fráboðað. Tað gjørdi Óli Holm í brævinum til Mikladals kommunu, og tí hevur hann tikið avgerðina í málinum um skúlan á Trøllanesi, sigur løgfrøðingur. Løgmaður heldur eygað við málinum**

HEIMILDARLOYSI
*Eyðun Klakstein*

Tað var ikki Torbjørn Jacobsen, men Óli Holm, sum formliga tók avgerðina um at áleggja Mikladals kommunu at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur.

Tað heldur Anfinn V. Hansen, løgfrøðingur.

– At ein landsstýrismaðurin hevur eina hugsan um nakað og sigur, at skúlin á Trøllanesi skal lata uppaftur, er eingin avgerð. Ein avgerð verður tikin, tá hon verður niðurfeld, og tað gjørdi Óli Holm, tá hann álegði Mikladals kommunu at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur.

– Tí er tað Óli Holm, sum er farin út um sínar heimildir og ikki Torbjørn Jacobsen. Torbjørn segði, at skúlin skuldi lata uppaftur, men formliga hevur Óli Holm tikið avgerðina, heldur løgfrøðingurin.

## Heita brævið

Tað var tann 20.juli í ár, at Óli Holm sendi bræv til bygdaráðið í Mikladali. Í hesum brævi áleggur landsstýrismaðurin bygdaráðnum at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur.

Ein løgfrøðislig frágreiðing, sum varð gjørt í Mentamálastýrinum í farnu viku, kom til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin ikki kann áleggja bygdaráðnum í Mikladali at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur.

Tí er ikki samsvar millum tað, sum Mentamálastýrið sigur seg hava heimild til, og tað sum stýrið í roynd og veru hevur gjørt.

Óli Holm sigur, at hann kendi tað sum sína uppgávu at kunna bygdaráðið í Mikladali um avgerðin hjá undanmanninum, Torbjørn Jacobsen, men tað var eitt mistak, at tað ikki varð skrivað í brævið, at tað var Torbjørn Jacobsen, sum í mai mánaði hevði tikið avgerðina.

## Kalla tað mistak

Sambært Anfinni V. Hansen er eingin ivi um, at brævið frá Óla Holm til Mikladals kommunu er ein avgerð.

– Óli Holm hevur sent brævið, har Mikladals kommuna verður áløgd at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur. Tað gjørdi Torbjørn Jacobsen eftir øllum at døma ikki, og tí er tað Óli Holm, sum hevur tikið avgerðina í hesum máli, sigur Anfinn V.Hansen.

Hvørjar avleiðingar skal tað hava fyri landsstýrismannin?

– Í hesum føri er eingin skaði hendur av skeivu avgerðini, og tí kanst tú kalla tað eitt mistak. Men tað er vánaligur umsitingarsiður at senda skriv út, sum tað ikki er heimild fyri.

– Avgerðin er heldur einki verd, tá tað ikki er heimild fyri henni, og tí fær hon ongantíð gildi. Men tað er greitt, at hetta er eitt mistak, sigur Anfinn V. Hansen.

## Løgmaður heldur vakt

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur, at Mentamálastýrið er komið í eina støðu, sum tað ongantíð átti at verið komið í, men hann er ikki farin inn í málið enn.

– Alt sum er illgrunasamt mótvegis einum landsstýrismanni, havi eg skyldu til at kanna. Verða greiðar ábendingar um, at nakað ólógligt er farið fram í stýrinum hjá Óla Holm, so havi eg eisini skyldu til at kanna tað, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður vil ikki gera viðmerkingar til brævið frá Óla Holm til Mikladals kommunu og niðurstøðuna hjá løgfrøðingi um, at tað er sitandi landsstýrismaður, sum hevur tikið eina avgerð í heimildarloysi.



*– Óli Holm hevur sent brævið, har Mikladals kommuna verður áløgd at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur. Tað gjørdi Torbjørn Jacobsen eftir øllum at døma ikki, og tí er tað Óli Holm, sum hevur tikið avgerðina í hesum máli, heldur Anfinn V.Hansen, løgfrøðingur*

Heini O. Heinesen:

# Sjálvandi tveir skúlar

**– Skal Mikladals kommuna verða fyrimynd, so skal helvtin av skúlunum í Føroyum leggjast niður, og tað er ikki rætt, sigur tjóðveldistingmaðurin í Norðoyggjum**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

– Tað er tann øvugta verð, at bygdaráðið vil leggja ein skúla niður, meðan landsmyndugleikarnir ynskja, at hann skal verða opin.

Tað heldur Heini O. Heinesen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin og bygdaráðsformaður í Kunoy.

– Skal Mikladals kommuna verða fyrimynd, so skal helvtin av skúlunum í Føroyum leggjast niður, og tað er ikki rætt.

– Allir politisku flokkarnir í landinum ganga inn fyri, at bygdaskúlarnir skulu varðveitast, og kann ein kommuna ikki bjóða sjey ára gomlum børnum skúlagongd í teirra egnu bygd, so er kommunan illa farin, heldur Heini O. Heinesen.

## Grava egna grøv

Hann vísir á, at í hansara kommunu verða skúlarnir í Kunoy og Haraldssundi brúktir hvør um annan, og tað sama er við sunnaru kommununi á Kalsoynni.

– Tí dugi eg ikki at skilja, hví Mikladals kommuna ikki eisini kann brúka skúlan á Trøllanesi.

– Tað næsta kann verða, at onkur vil hava bara ein skúla á Kalsoynni, og tí haldi eg, at Mikladals kommuna átti at ansa eftir, so hon ikki gravar sína egnu grøv í hesum máli.

Heini O. Heinesen heldur, at tað skuldi verið so líkatil, at kommunan keypti neyðugu skúlaútgerðina til báðar skúlarnar, tí tað gera tey alla aðrastaðni.

Vilhelm Johannesen:

# Stríðið má loysast

**Landsmyndugleikarnir áttu at tikið stig til, at skúlastríðið í Kalsoynni varð loyst. Ein uttanveltaður semingsmaður er eitt hugskot, heldur Javnaðartingmaðurin í Norðoyggjum**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

Vilhelm Johannesen, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, heldur, at skúlin á Trøllanesi skuldi verið latin uppaftur.

– Tað átti at borið til at brúkt somu skipan í Mikladals kommunu, sum tey gera í grannalagnum. Í Húsa kommunu verða tveir skúla brúktir, og tað sama er í Kunoyar kommunu, so eg dugi als ikki at skilja, hví skúlin á Trøllanesi ikki kann verða opin, sigur hann.

– Tað tykist eisini løgið fyri mær, at bygdaráðið skal ganga undan fyri at niðurleggja ein skúla í kommununi.

## Eingin løtt loysn

Vilhelm Johannesen heldur, at landsmyndugleikarnir skuldu tikið stig til at loyst stríðið, so børnini á Trøllanesi sleppa aftur í skúla.

– Kanska skuldi Mentamálastýrið heitt á ein uttanveltaðan meklara, sum kundi roynt at loyst trætuna, men eg dugi at síggja, at tað verður als ikki lætt.

– Støðan tykist nú løst so føst, at tað skal nógv til fyri at fáa annan partin av boyggja seg, heldur hann.

Rúna Sivertsen:

# Gott hugskot við meklara

**– Besta loysnin fyri børnini er helst, at tey eru saman í einum skúla, sigur tingkvinnan, sum heldur tað verða gott hugskot at senda meklara í Kalsoynna**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

– Tað er trupult at viðmæla eina loysn á stríðnum um skúlan á Trøllanesi, og tað er eitt gott hugskot at fáa ein uttanveltaðan meklara uppí.

Tað sigur Rúna Sivertsen, tingkvinna fyri Fólkaflokkin í Norðoyggjum.

– Um eingin vandi er fyri at flyta børnini millum bygdirnar, so vildi eg mett, at ein skúli, har øll børnini gingu allatíðina, var besta loysnin. Men eg skal ikki taka støðu til, hvar skúlin skal verða, sigur hon.

– Í dag ber illa til at skifta ímillum tveir skúlar, tí tað verður brúkt telduútgerð og annað, sum tað er trupult at flyta úr staði til stað.

## Nú er trupult

Rúna Sivertsen heldur, at tað verður ringt at finna eina loysn á stríðnum.

– Tá stríðið er komið so langt, er tað trupult hjá pørtunum at boyggja seg, og tí kann tað fara at verða sera trupult, at finna eina loysn, sigur hon.

– Men at ein uttanveltaður meklara, sum partarnir hava álit á, kemur uppí leikin, er helst eitt gott hugskot.



# Avgerðin skal takast á staðnum



**Tað er upp til bygdaráðið og skúlastýrið í Mikladals kommunu at gera av, hvørjir skúlar verða brúktir. Landsmyndugleikarnir skulu ikki blanda seg uppí tað, sigur løgmaður, sum umsitir kommunumál**

DEMOKRATI
*Eyðun Klakstein*

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur, at hvørki Mentamálastýrið ella Løgmansskrivstovan skulu hava nakra ávirkan á, um skúlin á Trøllanesi skal lata uppaftur ella ikki.

– Nýggja kommunulógin ger púra greitt, at tað eru teir lokalu myndugleikarnir, sum skulu taka avgerðina í slíkum máli. Prinsippið í lógini er, at ábyrgd og avgerðarrættur skulu fylgjast, og tað er umráðandi at minnast til, at bygdaráðið er fólksins umboð á staðnum, sigur Anfinn Kallsberg.

## Demokrati

Hann vil einki siga um, hvørt hann heldur, at skúlin á Trøllanesi skal lata uppaftur.

– Tað skal bygdaráðið í Mikladali gera av saman við kommunustýrinum, og eingin landsmyndugleiki skal broyta ta avgerðina. Tað er umráðandi, at bygdaráðini vita, at teirra avgerð er endaliga, og at eingin kann koma og broyta hana aftaná.

– Soleiðis er demokratiska skipanin, og hana skulu vit virða. Tað hevur týdning at lokalpolitikarar kenna ábyrgd og vita, at tær avgerðir, sum teir taka, standa við. Gera teir ikki tað, so verður tað altíð tann lættasta loysnin, sum verður funnin, tí so vita teir, onkur kann koma aftaná og taka tí trupula avgerðina fyri teir.

# Hava vitjað í Føroyum 22 ár á rað

**Eitt belgiskt par, sum í 1979 fyrstu ferð kom til Føroya, dámar so mikið væl í Føroyum, at tey eru komin aftur og aftur. Henda seinasta vitjanin er tann 22. í røðini**

FERÐAFÓLK
*Heri á Rógvi*

Eftir øllum at døma er talið á ferðafólki, sum kemur til Føroya vaksandi. Hetta merkir, at tað koma ferðafólk, sum ongantíð hava verið í Føroyum áður, á hvørjum ári. Men tað eru nøkur, sum vitja oyggjarnar oftani.

Victor Feyen og Josepha Peeters eru úr belgia, og tey hava vitjað í Føroyum heilar 22 ferðir innanfyri eins nógv ár. Bæði tvey eru tey nú um pensionistaaldur, men hetta heldur teimum ikki aftur at vitja í Føroyum á hvørjum ári.

Søgan um tey byrjar á Tenrifé í 1979, har tey hitta eitt føroyskt par. Tey verða boðin til Føroya á vitjan. Hetta er í apríl mánaði og í august sama ár, leggja tey leiðina til Føroya. Teimum hevur eftir øllum at døma dámt væl í Føroyum, tí síðani 1979 hava vitjaninar verið javnt og samt á hvørjum ári.

Steðgurin er vanliga einar 14 dagar. Belgiska parið býr í býnum Redie, ið liggur einar 50 km. frá Antwerpen í tí norðara endanum av Beliga. Tað tekur einar 8 tímar at koyra úr Jútlandi til Redie.

## Fólk og náttúra

Tað er eyðsæð, at tað er munur Belgia og Føroyum. Tey eru tvey heilt ymisk samfeløg, siga tey bæði. Ì Føroyum eru tað kanska ikki tey penastu tingini, vit hoyra um Belgia. Tey bæði siga eisini, at tað er nógvur kriminalitetur í Belgia, men hetta sæst einki til í Føroyum.

Hetta leiðir okkum til tann stóra spurningin, sum flest øll vildu spurt: Hvat fær eitt belgiskt par at leita til okkara oyggjar í Norðuratlantshavi?

- Vit dáma væl fólki og náttúruna. Fólkini eru sera fitt, og sum heild trívast vit sera væl í Føroyum, siga tey bæði, tá vit samskifta á flamskt-enskum.

Fleiri ferðir hava tey eisini tikið vinfólk við sær til Føroya. Tey bæði eiga trý børn, men hesi hava ikki verið eins røsk at vitja oyggjarnar.

Tá Føroyar og Beliga hittust til fyrsta altjóða dystin á grasvøllinum á Svangaskarði, so vóru tey bæði sjálvandi eisini til staðar.

Tá tey eru í Føroyum, plaga tey at búgva hjá Sámal og Tórhardu Bláhamar. Tey hava eisini verið í øðrum londum saman, eitt nú hava tey verið í Florida saman.

## Fleiri vitjanir til Føroya

Mongu vitjaninar hjá belgiska parinum hevur eftir øllum at døma givið Sámali Bláhamar blóð upp á tonna, tí hann hevur í hyggju at skipa fyri ferður fyri pensionistar í Belgia.

Ætlanin er, at Victor og Josepha skulu siga teimum, sum kundu hugsað sær at komið til Føroya eitt sindur um Føroyar, áðrenn hesi leggja leiðina til oyggjarnar.

Victor sigur, at hetta ikki verður nakar trupulleiki, og tey kunnu tosa í fleiri tímar um Føroyar og føroyingar, sum tey hava góðan tokka til.

Vit vóna at síggja fryntliga parið enn fleiri ferðir í Føroyum.



*Belgiska parið, Victor Feyen og Josepha Peeters, eru í hesum døgum á teirra 22. vitjan í Føroyum.*


